Ráevnini føroysk

Tingið samtykt avtaluna millum donsku ríkisstjórnina og landsstýrið

■ Við 21 atkvøðum fyri og ongari imóti gøðkendi tingið tysdagin avtaluna, landsstýrið og danska ríkisstjórnin undirskrivaðu 22. desember 1992 um at yvirtaka ráevnini í undirgrundini.

Landsstýrið legði avtaluna fyri tingið 14. januar. Eftir 1. viðgerð á tingi 29 januar varð hon beind í marknaðarnevndina, sum undir viðgerðini bytti sig í ein meirluta og triggar minnilutar.

Í meirlutanum voru Olaf Olsen og Birgir Danielsen úr Fólkatlokkinum, Sverre Midjord og Sommer Winther úr Javnaðarflokkinum. Teir tóku undir við avtalunni og mæltu tinginum at góðkenna hana.

Vist varð á, at málið um yvirtøku av ráevnum í undirgrundini hevur verið viðgjørt í fleiri samráðingarnevndum í mong ár og at danska stjórnin nú var ginginn øllum føroyskum ynskjum á møti.

Minnilutin Edmund Joensen úr Sambandsflokkinum tók ikki undir við uppskotinum, tí slík yvirtøka maaði burtur grundarlagið undir aldargamla sambandinum millum Danmark og Føroyar.

Edmund Joensen segði spurningin um undirgrundina í tvifaldari merking vera grundarag undir samvinnuni millum Danmark og Føroyar. Men føroyingar hava kravt ræði á undirgrundini og tað hava teir fingið.

Av øllum yvirtøkum, sum gjørdar eru síðan 1948 er henda tann tydningarmesta fyri lagnuna hjá øllum føroyingum. Tann endaliga gongdin fram móti skilnaðinum Danmarkar og Føroya millum er byrjað, segði Edmund Joensen.

Minnilutin Hergeir Nielsen úr Tjóðveldisflokkinum tók undir við uppskotinum um at góðkenna avtaluna, men visti eins og Edmund Joensen á, at tað av undanfarna landsstýri er søgureinging tá talað verður um eitt samráðingarúrslit. Danir einsamallir tóku avgerð um at flyta ráevnini í undirgrundini til føroysk sermál.

Hergeir Nielsen helt tað vera ein stóran spurning, hvussu skilagott tað er av landsstýrinum at góðtaka, at danir uttan viðari í avtaluni tryggja sær rættindi til egin samfelags- og vinnulívsahugamál í føroyskari ráevnisvinnu.

Minnilutin Helena Dam á Neystabø úr Sjálvstýrisflokkinum vísti á, at tað var Sjálvstýrisflokkurin, sum á fyrsta sinni legði uppskot fyri tingið um yvirtøku av undirgrundini. Hetta var í tingsetuni 1974/75, og uppskotið varð samtykt.

– Tað er harmiligt, at seyðtjan ár skuldu ganga aðrenn málið endiliga varð fingið upp á pláss. Vit kunnu nú staðfesta, at tíðin hevur ikki arbeitt til fyrimuns fyri Føroyar, tvørturímóti,– segði hon og vísti í hesum sambandi á marknatrætuna við Bretland.

Helena Dam á Neystabø heldur tað í sambandi við ráevnisspurningin hava alstóran týdning at fáa miðlinjuspurningin avgreiddan sum skjótast.

Eitt uppskot frá minnilutanum Hergeir Nielsen til samtyktar um at áleggja landsstýrinum at taka upp samráðingar við donsku ríkisstjórnina um at seinasta brotið um hjálandavinnu í avtaluni millum stjórnina og landsstýrið um ráevni í undirgrundini fellur burtur fall. Tað fekk einans 6 atkvøður.

pol

Atli Dam, fyrrverandi løgmaður, og Poul Schluter, fyrrverandi forsætisráðharri, skriva áðu undir avtaluna 22. desember í fjor. *Mynd: Dimmi/Thomas*

Ejnar Mikkelsen

HETTA er ein frásøgn, sum er fortald fyri Adami Wiehe í 1968.

Tann seinasti av teimum stóru donsku polargranskarunum, Ejnar Mikkelsen, segði frá um ein jólaaftan í Grønlandi, har hann og lagsbróðir hansara sotu tveireinir, avskormir frá allari hjálp yvirhøvur – tá allar síður umgirdir av lika so stórum vonloysi sum tann langa grønlendska náttin.

Ejnar Mikkelsen hevur føðingardag tollaksmessudag, og í ár fylti hann 88 ár. – Hesin gamli harrin, sum hevur harreikin eftir miðjum skalla, soleiðis sum teir gomlu skipararnir hava hann. Nú hevur hann fyri langari tíð síðan lagt lívsstarvið frá sær.

Mylius-Erichsen, Høeg-Hagen og Jørgen Brønlund blivu har uppi, umkomust í teirri naðileysu oyðimørkini. Knud Rasmussen og Peter Freuchen doyðu nógv harrans ár seinni – mettir av dógum og vóna gitnir. Eisini Iver P. Iversen, samstarvsfelagi Ejnars, er farin fyri stuttari tíð síðan.

Tá ið henda frásøgan verður fortald – í 1968 – er Ejnar Mikkelsen tann einasti, sum eftir er frá teirri tíðini, tá ið menn vóru meira enn menn. Tað er ein sjálvfylgja, at hann framvegis hugsar um Grønland, sum fyri hann alt lívið var av so alstórum týdningi. Lika so sjálvsagt er tað, at hann um jóltíðir minnist aftur á jólaaftan 1911, ið sáktans kundi verið – ikki bara hansara egni, men eisini tann síðsti hjá lagsbróðurinum Iver P. Iversen – tá ið teir báðir vóru so nær, sum hugsast kann, at faa somu lagnu sum Mylius-Erichsen og fylgi hansara.

– Mín tið í Grønlandi byrjaði í 1900, tá ið eg, sum 20-ára gamal, var við í rannsóknarferðini hjá Amdrup kapteyni, og árini aftana var eg við á tveimum øðrum polarferðum,– sigur Ejnar Mikkelsen. Tað var soleiðis vit mær, at allur hugur mín stóð til økini bar uppi, sum av skilafolki vóru roknað sum tápulinganna paradis.

Ein dagin, um heystið 1908, kom skipið hjá Mylius-Erichsen, «Danmark» aftur til København og hevði flaggið á hálvari stong – tí triggir av teimum, ið høvdu tikið lut í rannsóknini yvirí í Grønlandi vóru umkomnir har. Eg var beint tá komin heim av eini rannsóknarferð til havið millum Alaska og Norðpolin. Stutt eftir gjørdi eg av at fara til Grønlands fyri møguligvis at finna dagbókurnar hjá teim umkomnu, og hvat annað teir kundu hava lagt eftir sær í isoyðuni; tí alt tað tilfarið var av stórsta týdningi fyri viðari gransking av Grønlandi. Arið eftir, um summarið 1909, lógdu vit frá landi um bord á norðlandsjaktini «Alabama» við kós móti Eystur-Grønlandi, og eftir ein sera truplan Grønlands-tur komu vit til Shannon-oynna norðaliga á eystursíðuni. Ætlan mín var at fara somu rutu sum Mylius-Erichsen, ein teimur upp á 2000 kilometrar, fyri at finna varðarnar har uppskriftirnar óivað vóru eftirlatnar. «Alabama» skuldi so bíða eftir mær, til eg kom aftur til Shannon. Sum lagsbróðir hevði eg valt mær ein ungan loytnant, men stutt eftir, at vit vóru komnir yvir til Grønlands, bleiv hann so ringur í fótunum av frostsárum, at hann øgjørligt kundi luttaka í eini so langari og strævnari ferð. Í hansara stað váldi hann ein, Iver P. Iversen av navni, – men hann var nú ikki hvør sum helst – faa vit seinri at siggja. Hann var eitt kapittul fyri seg. Hann hevði atikið sær starvið sum motormaður á «Alabama»; var 4-5 ár yngri enn eg – og hevði ikki áður verið í Grønlandi, ei heldur hevði hann dróymt um at luttikið í eini kanningarferð á innlandsisinum. Men tá ið hann hoyrdi, at mær vantaði ein mann til hesa stóru og álvarsomu ferðina, kom hann yvir til mín og sagði: Eg eri jú arbeiðsleysur so leingi, sum «Alabama» back skal liggja her og bíða. Um tygum leggja lag í, so vil eg fegin koma við tygum. Og hóast vágiligt, so tók eg við tilboðið hansara. Í apríl 1910 tóku vit avskeið við manningina á «Alabama» og fóru við báðum sletum – okkara, pakkaðar við øllum proviantinum og øðrum útstyri og drignir av 24 hundum. Leiðin lá norðureftir til «Danmarksfjorden» og síðan suður við eysturstrondini, til vit – eftir okkara metingum – aftur kundu verið á Shannon einaferð fyrst í august. Eg hevði givið boð um, at «Alabama» ikki skuldi bíða eftir okkum lengur enn til 15. august. Um vit tá ikki vóru komnir aftur, so skuldi skipið leggja lið um lið uttan alla tíðina at rena undir hvønn annan, og tað vildi móða okkum enn meira. Men ein dagin, tá ið Iver gekk aftast, bleiv hann við at koma upp á síðuna av mær og siga okkurt óskiljandi. At enda var tað mær greitt, at tað var nakað ávist, ið nívdi hann. Eg hevði ein illbata á mær um hvat, tað mundi vera, tí eg hugdi beint í eyguni á honum og spurdi: Ælvara tos, Iver, er tað riflan, sum tú er bangin fyri? Hann rætti mær vápnið og svaraði: Ja, vil tu ikki heldur bera hana sjálvur, so skal eg bera okkurt hjá tær í staðin fyri. Eg vil ikki ganga við hesi rifluni longur – hon er ov vandamikil.

Tá var eg greiður yvir, hvussu til stóð. Lagsbróðir mín kendi seg nú so óáitandi vegna svongd, at hann bar otta fyri, at hann kundi skotið meg niður aftan ífrá, og síðan eta seg mettan av tí, sum ikki longur var eg.

Men eg visti uppskotti hansara fra mær. Hann skuldi bliva við at bera riflina, tí hvør veit, um eg ikki kundi funnið uppá at gera tað sama sjálvur?

Eina nátt í manalysi í desember náddu vit fram til tað staðið á Shannon oynni, har vit vóru farnir av «Alabama». Skipið lá har framvegis, men var nú knasað sundur av ísinum. Inni á strondini stóð eitt smáttuskapilsi, gjørt av vrakleivdum. Og manningin var langt síðan farin hiðani og suðureftir. Hetta var ein stóða, sum vit eisini høvdu roknað við, og sammett við tað, sum vit høvdu verið úti fyri teir seinastu mánaðirnar, var hetta ikki nøkur vanlukka sum so – her var hóast alt ein smátta at liggja í og nakað av provianti, sum vinir okkara høvdu latið liggja eftir, umframt ein rifla og eitt sindur av loduri.

Veturin gekk við at innrætta smáttuna sum frægast og við at siggja fram móti komandi sumri, tá vit vóru vísir í at bliva bjargaðir. Men vit høvdu enn eitt stórt vonbrot til góðar, tí tá ið summarið endaliga kom, var rekaísurin so tjukkur, at tey «Kipini», sum veruliga vóru har uppi og leitaðu eftir okkum, ikki sluppu igjognum hann. Okkara vónloysi váks eisini nú bæði heystið og tann myrka tíðin la fyri framman. Nú vistu vit, at vit vóru noyddir at skula klara aftur ein vetur. Tað slapst ikki undan, at tað nivandi einsemið eisini hevði sína ávirkan á okkara salarstoðu – vit bliva báðir ikki sørt undarligir. Ofta var tað so leiðis, at tað bar illa til at skilja imillum ta vaknu tilveruna og svovnin: vit søgdu ikki í nátt dróymdi eg, at... men har aftur imóti í nátt var eg heima í København, í nátt tosaði eg við mammu mína. Og okkara gatufóri vísti seg eisini á annan hátt –, ein dagin tá Iver kom inn, segði hann yvirsvinnur: – Eg havi beint nú sæð abba mín; hann sat á einum steini hartil.

Vit høvdu nú verið tveireinir í yvir hálvtannað ár, og tað var onki evni eftir, sum vit ikki høvdu viðgjørt aftur og aftur. Men tosa saman máttu vit jú, og bleiv tað lætt til antin lógin ella óhugnalig evni vit kjakaðust um. Eitt, sum vit ótta vendu aftur til, var til ta ferðina, tá ið Iver ikki tordi at ganga aftan fyri meg við riflini.

Fyri okkum báðar var spurningurin: hevði nakar av okkum roynt at bjarga lívi sínum við at eta av líkinum av starvsfelaga sínum? Tað var ongin okkara forur fyri at svara við einum greiðum nei ella ja – og tað bryggjaði heldur ikki nakar av okkum seg um at svara uppá, sjálvandi. Men Iver var nokk hann, ið kom nærmast einum svari. Eina ferð, tá eg aftur setti honum spurningin, svaraði hann: – Eg hevði aldrin fingið meg til at róra teg, annars eg fyrst hevði blakað hendurnar burtur, ella ið hvussu er fingrarnar. Hendurnar skilja eitt menniskja frá dýrunum.

Men vit kjakaðust eisini um minni óhugnalig evni, gentur t.d. Onkuntið sótu vit og fantaseraðu um, at ein bátur við vøkrum gentum strandaði nærhendis smáttu okkara. Og tá ið vit leiddust av at dróyma okkum til henda móguleika, kundu vit byrja at tosa um, at hvat nú, um eitt loftskip lendi á Shannon – fult av deiligum gentum!

OG so nærkaðust onnur jólini hjá Iver og mær í ti grønlendska einseminum. Nú knipti tað av álvara við føðini. Provianturin var fyri langari tíð síðan uppi, og í kavaroks-vetrarnattini var so gott sum øgjørligt at koma í skotmala av teimum fáu dýrunum har á leiðini. Vit fyrireikaðu okkum til at halda ein svangligan jólaaftan – men knappligva var eitt sindur av eydnu við okkum. Ein dagin fúnnu vit eitt harospor í kavanum – men vit róknaðu ikki við at kunna skjota haruna í ti sparsomu vetrarsólini, so vit settu eina fellu fyri hana, og teir næstu dagarnar skiftust vit til at halda vakt, um nakað fór at henda. Og tað hendi sanniliga nakað: vit fingu fatur á tveimum harum. Tær sóu so neyðarsligar út við sínum bangnu eygum, og eina lotu stóðu vit og tosaðu um at sleppa teimum av stað aftur – harragud, tær vóru jú fangaðar í eini fellu eins og vit sjálvir! Men so fekk skynsemið ræðið: jólaaftan stóð fyri durum, og harusteik var næstan lika so góð sum dunnusteik. Harurnar mattu lata liv.

Jólaaftan stokti Iver báðar harurnar hjá okkum, meðan eg gjørdi reint í húsinum – tað gekk út uppá, at eg gekk og skovdist eitt sindur við einum kustaskapilsi; tað var ikki gjørligt at brúka vatn – tað hevði tryst beinan vegin. Vit kundu ennta ikki vaska okkum; men vit høvdu heldur ikki havt nakra sápu hesar seinastu mánaðirnar.

Hóast harusteikina gjørdist jólaaftan kortini lika so dapur, sum vit høvdu væntað og stúrt fyri. Tá ið klokkan bleiv so mikið nógv, at tey í Danmark dansaðu um jólatræið og sungu «Glade jul, dejlige jul,» krupu vit báðir niður í soviposarnar, mutlaðu góðanátt hvør við annan og vónaðu, at vit ið hvussu var kundu dróyma okkum til eini gleðiligi jól.

TIDLIGA um morgunin tann 17. juli 1912 dundraði hart upp á hurðina hjá okkum. Tað var hent fyrr, at ein ísbjørn hevði roynt at bróta inn, so vit ruku á fótur, tóku eftir riflunum, klárir at taka móti.

Í næstu lotu varð hurðin latin upp. Eyri uttan stóðu nakrir menn undir leiðslu av einum herðabreiðum skipara, sum á norskum segði: «Kom her við riflunum, vit koma til tykkara sum vinir!» – Tað, sum vit høvdu biðað eftir og dróymt um í langa tíð, var umsiðir hent: vit vóru bjargaðir. Tann lítli norski kobbafangarin, «Sjøblomsten», hevði verið fram við eysturstrondini á kobbaveiðu, men ikki havt eydnuna við sær. Skiparin hevði tí gjørt av at fara og leita eftir teimum báðum saknaðu danskarunum – og so móguliga faa tær 10 tusund kr., ið lovaðar voru í bjargingarløn til tann, sum fann okkum deyðar ella á lívi.

Gleði okkara var út yvir alt mark, og manningin á «Sjøblomsten» tók lut í henni saman við okkum. – eftir at hava fingið vissu fyri, at vit vóru rættsiktaðir. Aftana fortaldu teir fyri okkum, at tá ið teir sóu okkum í smáttuni viltskeggjutar, útsvoltaðar og við vilt útspilaðum eygum, tá vóru teir ikki í tva um, at vit vóru ørir eftir so nógvar mánaðir í einsemi!

Í ti lítla norska havnabýnum Ålesund fingu Iver og eg okkara fyrsta bað, og barberurin í býnum varð settur til at klippa hár og skegg, sum var tovt saman til ein kleiggjutan parúkk av reinsdýrahári, feitti og skitti.

Og so nakrar dagar seinri komu vit til København, har kein var full av fólki, teirra millum limir í rannsóknarnevndini undir høgum hatti, nakrir ráðharrar, umboðsmaðurin hjá Christian Tiggjunda og so foreldrini hjá Iver og mini, sum neyvan høvdu væntað nakrantið at siggja okkum aftur.–»

Ejnar Mikkelsen kapteynur hyggur seg um í arbeiðsrúmi sínum; har bókahillarnar standa fyltar við bókum um tað Grønland, sum bleiv hansara lívslangi kærleiki. Á vegginum hanga eisini eitt otal av myndum og malningum frá hesum áhugaverda landinum, sum tað ta var, og sum hann fyrst í hesi øld var við til at kanna, lýsa og kortleggja. – »Síðan tá havi eg verið fleiri ferðir yviri í Grønlandi – ikki minst av tí, at eg eri vorðin umsjónarmaður fyri Eysturgrønland og formaður í Scoresbysund-nevndini. Iver har aftur imóti setti aldrin sín fót aftur á grønlendska jørð – so nógvar trupulleikar hevði hann havt uppi í innlandsisinum.

Og nú er hann deyður, mín gamli vinur, sum deildi hæði ilt og gott við meg í teim 27 longu mánaðunum, sum legði sitt lív í mínar hendur, tá ið vit fóru av stað, sum bjargaði mær undan deyðanum, tá ið eg lá so ringur av skerbúki, og sum var saman við mær ein jólaaftan, har vónin um at yvirliva blaktraði líka so ótryggt sum login á okkara seinasta kertuljósi í teirri køldu smáttuni á eysturstrond Grønlands.»

EJNAR MIKKELSEN var føddur 23. desember 1880. Sum ungur for hann til sjós og las síðan til stýrimann. Er sum nevnt viða gitin sum polargranskari. – Hann grundaði í 1924 niðursetubygdina Scoresbysund og í 1934 var hann útnevndur til umsjónarmann fyri Eysturgrønland. Hann hevur skrivað hópin av ferðafrásøgnum frá Arktis leiðini, har umframt hevur hann skrivað fleiri dreingjabókur og aðrar við um arktiska Ameríka.

Ejnar Mikkelsen var eisini kendur her á okkara leiðum. Hann var eina tíð uppi í hvalaveiðufyritøkuni í Lopra; og tá ið skonnartin «Yvonna» var keypt til Vágs úr Frankariki í sínari tíð, var hann ein av partaeigarunum í henni. – Ejnar Mikkelsen doyði 4. juni 1971, yvir 90 ára gamal.

Ein sonur hansara er kendi listamaðurin, Sven Havsteen Mikkelsen, sum ofta hevur verið í Føroyum.

Iskoyti

Ejnar Mikkelsen var av góðum bergi brotin. Páppin var tann kendi skúlamaðurin Aksel Mikkelsen, f. 14. august 1849, sum m.a. fekk smið sum skylduga lærugrein inn í fólkaskúlan. Hann bleiv í 1886 fyri stóðumaður fyri «Dansk Sløjdlærerskole», og í tíðarskeiðnum 1907-18 var hann umsjónarmaður fyri hesi lærugrein.

Í 1884 skrivaði Aksel Mikkelsen hesi orð, just sum endurgivin «Ved syndefaldet blev legemliggt arbejde nødvendigt for den faldne menneskelægt, fordi det efter forholdene var det bedste middel til at aflede og sprede dårlige tanker, bringe ro og ligevægt i det oprørte sind, klarhed og omtanke i den forstyrrede organisme samt til at dygtiggøre mennesket, såvel til kamp, som til forsvar og til at gøre sig jorden underdanig.»

Aksel Mikkelsen doyði 19. okt. 1929.

Bjarne Skaalum, V. tyddi.